# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Eg kann við mín besta vilja ikki geva Bárði Nielsen rætt, eg velji at halda, at Bárður er feil siteraður, tá ið hann sigur: »Íløguhugurin er sera stórur í Føroyum í løtuni. Men nú kanska tað steðgar upp. Og tað er bara gott fyri landsbúskapin«*

VILHELM M. JOHANNESEN, SNIKKARAMEISTARI

## Nýggj byrjan fyri Læraraskúlan

Uppskot til nýggja pedagog- og læraraútbúgvingar er nú komið fyri dagin. Lat tað verða sagt beinanvegin, at talan er um ein sera áhugaverda, visjonera og sera væl út hondum greidd frágreiðing, sum nevndin hevur latið landsstýrismanninum. Sum longu kunnað um í tíðindagreinum verður mælt til fýra ára yrkisrættaðar BA útbúgvingar. Hetta er í sjálvum sær eitt framstig og fyri pedagogútbúgvingina eitt sera stórt framstig í og við, at útbúgvingin verður longd við hálvum ári. Víðari verður mælt til, at menna samanspælið millum ástøði og starvslæru og til, at fráláran skal fremjast við støði í gransking. Samstundis sum mælt verður til, at báðar útbúgvingar soleiðis verða lyftar upp á akademiskt støði, verður mælt til javna eftirmeting og fastar karmar. Hetta kann bara vera gott.

Pedagog- og lærarastørvini eru alfa og omega í nútímansgjørdum og altjóðagjørdum samfelag. Við PISA kanningini hava vit fingið eitt so álvarsligt ávaringarskot fyri bógvin, at hvørki myndugleikar, foreldur ella yrkisfeløg framhaldandi kunnu loyva sær at sita hendur í favn. Nú er allar fortreytir til staðar fyri at kunna seta á stovn pedagog- og læraraútbúgvingar, ið eru á sama støði sum tilsvarandi útbúgvingar í heimsins fremstu londum. Her má ikki drálast, men her má berast skjótt at. Mentamálaráðharrin má fáa politisku viðgerðina frá hondini sum sjótast og koma í tingið við málinum. Hann hevur alt við sær, og fáur man fara at ditta sær at royna at leggja út politiskar fótonglar fyri eitt so gott og so týðandi mál. Umstøðurnar gera, at allir partar nú ynskja broytingar her og nú!

Frálíka frágreiðingin um nýggjar pedagog- og læraraútbúgvingar, nýggja leiðsla skúlans, tann positivi andi, sum tykist valda kring alt hetta mál og støðan sum heild hava stóran týdning fyri fyri Føroya læraraskúla. Nú er ikki at liggja sjóvarfallið av sær, men nú er at bera skjótt at. Alt talar fyri einum góðum úrslitið, sum ber við sær eina nýggja byrjan fyri Føroya læraraskúla og tær útbúgvingar, ið har verða givnar. Hetta mál snýr seg, tá samanum kemur, um tað mest dýrabara, ið vit eiga: børnini og tey ungu, sum skulu bera samfelagið víðari inn í eina framtíð, ið setir størri og størri krøv til útbúgving, førleikar og vitan. Landsstýrismaður, løgting og allir avvarandi partar hava eina sera stóra ábyrgd at liva upp til í hesi søk. Alt bendir á, at hetta fer at eydnast, tí her kunnu vit ikki annað enn draga eina og somu línu.

**Sosialurin**

# Varaborgarstjórin í Fuglafirði hóttir fólk

**JÓHAN HERI JOENSEN**



Las greinina í Oyggjatíðindi 25. august 2006, har Jann Toftegaard hóttir býráðslim. Stríðið stóðst um, hvat býráðslimir kunnu loyva sær og ikki.

Tað sigst, at orðadrátturin var so harður, at grannarnir kundu fylgja við hvørjum orði sum sagt varð. - Ikki eiti á lívligum býráðspolitikarum.

Uttan at vita nágreinliga hvat tosað varð um, so bendir skrivingin í Oyggjatíðindi á, at tað í øllum førum er líkt tí máli, sum eg sjálvur hevði liggjandi inni hjá Fuglafjarðar kommunu.

Um hettar er so ella ikki, so haldi eg í øllum førum, at borgararnir í Fuglafirði eiga at vita, hvussu politikararnir røkja/misrøkja sítt starv sum fólkavald umboð.

Nógvar ymiskar søgur havi eg hoyrt í býnum um mítt mál, tí vil eg her alment lýsa gongdina, fyri at beina tær skeivu av vegnum.

Í juni mánaði 2005 søkti eg vegna Spf Í Støð um loyvi til at byggja oman á kappróðrarneystið. Ætlanin varð at brúka fyrstu hæddina til handilshølir og restina til íbúðir ella skrivstovur, høvdu tí brúk fyri vindeygum á endasíðunum.

Vit hildu, at viðgerin av málinum sá ljós út, býráðslimirnir vóru positivir og vóru sinnaðir at geva byggiloyvi til framlagda uppskotið, bygningurin í síni heild varð góðtikin, men teir ynsktu eina meira útgreinaða tekning av innrættingini, so rýmingarvegirnir vóru sambært galdandi lóg. Hettar vóru bert rímulig krøv, sum vit saktans vildu ganga á møti.

Á hesum býráðsfundi reisti Jann Toftegaard seg og metti seg vera ógegnigan, men áðrenn hann fór av fundinum vildi hann gera greitt, við peikifingrinum á lofti, at hann eisini hevði sent inn eina umsókn um bygging.

Sjálvur meti eg, at tað sømdi seg betur fyri Jann, um hann sat inni á fundinum, heldur enn upp á kvamsvís at melda seg ógegnigan og arbeiða sum óður tarvur aftan fyri kulissurnar fyri egnum áhugamálum.

Nakað seinni fingu vit boð um at koma á fund við Teknisku nevnd.

K. og Jan Toftegaard høvdu nú sent inn eina prinsipptekning (skitsu) - tað varð frá nú av at henda skitsa stýrdi málinum. Møguleikarnir í okkara projekti vóru fulkomuliga endavendir. Á fundinum varð eisini sagt, at um Jann ikki fekk hettar loyvið, og Heri bakkaði út, so skuldi hann sjálvur byggja omaná neystið.

Tað er einki skeivt í tí, at Jann keypir ognina Bedingin/Íshúsið sum spekulatiónskeyp, men at hann sum varaborgmeistari og limur í teknisku nevnd misnýtir sítt politiska vald til egnan fyrimun, er átaluvert.

At Jann við einari prinsipptekning skal stýra okkum og siga okkum, hvussu vit skulu byggja, og at hann eisini skal fáa stuðul frá býráðslimunum, kundu vit ikki góðtaka. Tí sleptu vit okkara ætlan við bygninginum oman á kappróðrarneystinum.

K. og Jann Toftegaard kunnu nú byggja bæði á egið økið og oman á kappróðraneystið. Vit ætla ikki at leggja teimum forðingar í vegin.

Persónliga eri eg vísur í, at Jann við sínum óhøviska málburði sigur hettar verða **HELVITIS LYGN**. Men satt er frá fyrsta bókstavi og til síðsta punktum.

Eg kundi saktans lýst hettar mál meira gjølla og farið út í smálutir, men eg haldi ikki, at tað tænir nøkrum endamáli.

Flestu kommunur liggja á knøunum fyri fólki, sum eru áhugaði í at gera íløgur. Fuglafjarðar kommuna má sigast at hugsa annarleiðis. Her verður bein spent fyri teimum sum vilja nakað.

# Handverkaratrotið er gott fyri landsbúðskapin

**VILHELM M. JOHANNESEN,**
snikkarameistari



### Viðmerking til Bárð Nielsen, landsstýrismann, í samb. við grein í Dimmalætting 18.08.05.

Eg kann við mín besta vilja ikki geva Bárði Nielsen rætt í sínari niðurstøðu, eg velji at halda, at Bárður er feil siteraður, tá ið hann sigur. »Íløguhugurin er sera stórur í Føroyum í løtuni. Men nú kanska tað steðgar upp. Og tað er bara gott fyri landsbúskapin«.

Eg standi eitt sindur spyrjandi. Heldur fíggjarmálaráðharrin tað verða skeivt av okkum sum hava brúkt mong ár til at byggja upp handverksvirki, gera íløgur í virkir, at læra upp ung til hesa vinnu í landi okkara. Er hettar eftir tíni metan als ikki til gagns fyri landsbúskapin???

Eg skal fyri ein góðan ordan viðmerkja skilagóðu greinina í Dimmu 14.08.06 hjá Eli Brimsvík formanni í Havnar Handverkarafelag frá 14.08.06. Hann sigur, at lønirnar eru hægri í Norra og Danmark enn her, tað kann verða rætt fyri danskar handverkarar. Men ikki fyri flestu føroyingar sum arbeiða uttanlands fyri uml. 160/165 íroknað frítíðarløn, pensjón, v.m. krónur um tíman sama fyri yvirtíð og leygardagar.

Hettar er munandi minni enn, hvat teir høvdu fingið fyri somu tímar í Føroyum.

So niðurstøðan má verða, at føroyskir handverkarar arbeiða fyri undirløn uttanlands.

Men sum E. B. sigur, so er tað frádrátturin sum er rættuliga stórur, ið ger munin, og tað sum verður eftir á botnlinjuni eftir skatt er tað, ið telur.

Rætt skal verða, eg skilji handverkarar sum fara burtur eina tíð at arbeiða nógvar tímar, teir flestu hava innstillað seg upp á at arbeiða minst 12 tímar 6 dagar um vikuna meðan teir eru burtur, og tað blívur til nógvar pengar sjálvt við tí lønini teir fáa, har hjálpir stóri skattafrádrátturin sera væl til.

**Sosialurin**
**Sosialurin**
Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.